Virki, yrkisfeløg og stovnar í nýggjum felagsskapi:

# Taka seg saman um at útbúgva starvsfólkið

**30 limir í felagsskapi, sum vil geva fleiri møguleika at fáa eftirútbúgving. Tvey skeið fyri jól, annað í handilsskapi, hitt í virkisrakstri.**

**Skeiðini verða hildin í Føroyum og eru tí bíligari, tí ferðakostnaðurin verður spardur**

»Áhugafelagsskapurin skeiðvirksemi«. Hetta hátíðarliga heitið er navnið á einum nýggjum felag, sum hevur til endamáls at kanna tørvin á vinnuligari og fyrisitingarligari eftirútbúgving, skipa fyri skeiðum nøktandi henda tørv og skapa figgjarligt grundarlag undir skeiðvirksemi felagsins.

Virki, yrkisfeløg og stovnar kunna vera limir. Í løtuni eru 30 limir. Limagjaldið er í minsta lagi 1000 kr. um árið.

Felagsskapurin varð stovnaður 1. mai í ár og mánadagin helt starvsnevndin ein tíðindafund. Í henni eru Heðin Samuelsen, formaður, Bernd Johansen, næstformaður og Søren Christiansen, skrivari.

### Ársskrá

Starvsnevndin hevur lagt til rættis tvey skeið (tey eru lýst í blaðnum í dag). Annað verður í Havn um tvær vikur. Tað er fyri handilsfólk og er um nýmótans handilsrakstur. Hitt skeiðið verður í Vágum fyrst í november. Tað er fyri ábyrgdarfólk á øllum stigum á virkjum og stovnum og er um virkisrakstur. Tilsamans er pláss fyri 60 fólkum á hesum skeiðum. Lærarnir koma úr Danmark.

Annars er ætlanin, at starvsnevndin á hvørjum aðalfundi skal leggja fram uppskot um skeiðvirksemi tað næsta árið, bleiv upplýst á tíðindafundinum.

### Fleiri fyrimunir

Tað var Bernd Johansen, sum kom við uppskotinum um at stovna felagsskapin. Handilsskúlin og Fiskasølan tóku beinanvegin undir við uppskotinum. Brøv við tilboði um limaskap blivu send til 40 virkir, yrkisfeløg og stovnar, bæði almennar og privatar. Millum 25 og 30 teknaðu seg beinanvegin.

Á tíðindafundinum bleiv vístá teir fyrimunir, sum eru við einum slíkum felagsskapi. Tað er biligari at halda skeiðini her í Føroyum í staðin fyri at senda fólkið av landinum. Tað verður eisini møguleiki hjá einum virki til dømis at senda nógv fleiri av starvsfólkum sínum á skeiðini.

— Ofta er tað so,sigur Bernd Johansen, at tá eitt ella tvey starvsfólk fara á eitt skeið, so standa tey rættiliga einsamøll við sínum kunnleika, tá tey koma aftur á virkið ella stovnin. Hini starvsfólkini fata ikki rættiliga, hvat hesi, sum hava verið á skeiðinum, tosa um. Hinvegin hava fleiri starvsfólk høvi at fara á skeið, so hava tey eina felagsvitan aftaná og skilja hvønn annan betur á arbeiðsplássinum.

### Kanning

Starvsnevndin segði á tíðindafundinum, at tað bleiv ikki gjørd nøkur beinleiðis kanning av tørvinum á skeiðvirksemi, áðrenn felagsskapurin bleiv stovnaður.

— Men tað er okkara fatan, at tað er tørvur á fleiri skeiðum, sigur Bernd Johansen.

Annars fer felagsskapurin nú at gera eina fyribilsanalysu um, hvar tørvurin á skeiðum er mestur.

Heðin Samuelsen, handilsskúlastjóri, bleiv spurdur, um ikki felagsskapurin virkar á økinum hjá Handilsskúlanum. Hann heldur ikki, at felagsskapurin fer at nerva Handilsskúlan.

— Sjálvandi skuldu vit havt nógv fleiri smærri skeið. Men umstøður hava ikki verið til tess, sigur Heðin Samuelsen.

# Nónhamar skal kannast — fær onki á grunnum sjógvi

Tekniska deildin hjá landsstýrinum er biðin um at kanna trolaran Nónhamar, upplýsir Jørgen Hansen, fulltrúi í landsstýrinum. Jørgen Hansen er í nevndini, sum landsstýrið setti at standa fyri rakstrinum av Nónhamri.



**Nónhamar hevur verið saltfiskatúr eystanfyri í ár. Hann royndi einaferð við síðuna av einum norskum trolara á grunnum sjógvi. Tann norski trolarin fekk dupult so nógvan fisk.**

**Tað kann hugsast, at tað er skrúvan, sum ger ov nógvan gang, sum er orsøkin til, at Nónhamar fær so lítið á grunnum sjógvi**

Tað, sum tekniska deildin skal kanna, er, hvi Nónhamar roynist so illa á grunnum sjógvi. Hann fær nógv minni enn aðrir trolarar, tá hann roynir á grunnum sjógvi. Hóast ekkoloddið vísir, at fiskur er, kemur lítið og onki í trolið. Á djúpum sjógvi roynist Nónhamar eins og aðrir trolarar.

Nónhamar roynir nú undir Føroyum. Hesin túrurin hjá honum byrjaði illa. Hann fór út leygardagin í næstsíðstu viku, men kom inn aftur longu sunnudagin við spælskaða. Umvælingin var liðug hósdagin, og tá fór Nónhamar út aftur.

## Tit ringja — vit skriva



Ringið telefon **11820** ella **14720**



Soleiðis sær loyvisbrævið til lutaseðlasølu út

## Hvar eru tey drignu tølini

Kann Sosialurin fáa onkran at svara hesum spurningi:

Oftani vitja dreingir og gentur heima hjá okkum við lutaseðlum. Eg plagi altið at stuðla eitthvørt endamál og keypi tí sum oftast ein ella fleiri lutaseðlar, tá børnini banka uppá dyrnar við lutaseðlunum í hondini.

Herfyri keypti eg lutaseðlar til frama fyri ávist endamál. Hetta var tann 16. august og í seðilinum stóð, at drigið varð tann 18. august og lýst í útvarpinum og bløðum. Eg havi roynt at finna tey drignu tølini sum lýst, men eg havi einki funnið ella sæð.

Er eingin lóg um tílíkt? Eigur tað ikki at verða lýst í bløðunum sama dag, sum skrivað á sjálvum seðlinum?

**Lutaseðlaeigari**

Ein og hvør, sum ætlar at selja lutaseðlar í Føroyum, skal hava skrivligt loyvi til tess frá landsstýrinum.

Í loyvinum standa tær ymisku treytirnar. Men har stendur onki um, nær tey drignu tølini skula kunngerast. Tað stendur heldur onki hesum viðvikjandi í nakrari lóg, kunngerð ella reglugerð.

So feløg ella onnur, sum selja lutaseðlar, avgera sjálvi, nær tey lýsa tey drignu tølini og kann hetta verða styttri ella longri tíð eftir sjálvan dráttardagin.

## Risaferjan

Fjúrtandi prentaði herfyri røðuna, sum Hergeri Nielsen, landsstýrismaður, helt undir aðru viðgerð av uppskotinum um at upploysa tingið.

Har standa m.a. hesi orð:

»Útlendskt felag hevur í umbúna at seta risaferju inní sigling hendan vegin.

Hvat er hetta fyri eitt felag og hvør er risaferjan, landsstýrismaðurin meinar við? Tað stendur ongastaðni í røðuni.

**Siglingarmaður**

Felagið er DFDS og risaferjan er Winston Churchill upplýsir Hergeir Nielsen.